# Nichels nýggjur KÍ-formaður

Á nevndarfundi týsdagin gjørdi leiðslan í KÍ av, at Nichels Lützen verður nýggjur formaður í felagnum.

Eitt formansskifti gjørdist neyðugt, tá Gestur Hovgaard um vikuskiftið boðaði frá, at hann ikki longur vil vera maðurin, sum myndar KÍ, og at hann tí tók seg úr nevndararbeiðinum.

Sambært viðtøkunum, so tekur næstformaðurin við, um formanninum berst frá, og í løtuni er heldur ikki neyðugt at innkalla til eykaaðalfund við nevndarvali á skránni.

- Viðtøkurnar geva nevndini heimild at taka aðrar ábyrgdarpersónar inn, um hetta gerst neyðugt, og helst verður tað hetta, sum verður gjørt fyribils, sigur John William Joensen, sum er samskiftisleiðari í KÍ.

Hann sigur, at møguleikin fyri eykaaðalfundi sjálvandi eisini varð umrøddur týskvøldið, men at hetta í løtuni ikki er aktuelt.

- Vit vilja í øllum førum fyrst hava eina loysn á karmunum kring felagið. Her hevur nevndin í eina tíð arbeitt við at skapa eina tryggari legu, og hetta arbeiðið verður væntandi liðugt um fáar vikur.

Við hesum verður helst sipað til samráðingarnar, sum hava verið við kommuna um yvirtøku av KÍ-høllini. Júst, hvør leisturin í hesum verður, er enn ikki greitt, men sum skilst, so eru bæði vanligir ognarar og kommunalu myndugleikarnir sinnaðir at finna eina loysn á trupulleikanum.

-jm

# Veljast skal millum tíð og tein



*Fáa klaksvíkingar sín vilja, verður kappróðurin á norðoyastevnu bert á 1000 metra málinum*

**Klaksvíkar Róðrarfelag vil hava aðalfundin í Róðrarsambandinum, sum verður 2. hvítusunnudag, at geva loyvi til, at allir róðrarnir á Norðoyastevnu í ár vera á 1000 metrum**

KAPPRÓÐUR

*Jóannes Hansen*

Tá ið Róðrarsamband Føroya, RSF, fer at hava aðalfund 2. hvítusunnudag, skal støða takast til ynski frá Klaksvíkar Róðrarfelag um, at allar kappingarnar á Norðoyastevnuni í ár, sum verður 4. juni, skulu vera á túsund metrum. Tað vanliga var, at tað á Vánni í Klaksvík varð róð á 1000, 1500 og 2000 metrum. Men síðani aliringar vórðu lagdir heimi undir Kunoyarnesi hava 10-mannaførini kappast á 1500 og ikki á 2000 metra teininum.

Nú vil Klaksvíkar Róðrarfelag hava loyvi at stytta róðrarteinin á Norðoyastevnu uppaftur meiri. 8-mannaførini og 6-mannaførini við monnum hava saman við 10-mannafórunum kappast á 1500 metrum, men nú er ætlanin, at hesar manningarnar eisini skulu kappast av 1000 metra málinum, sum er norðanfyri Kósina og heimanfyri Grønaból, og sum 5-mannafórini við gentum og dreingjum og 6-mannafórini við kvinnum hava kappast á.

Um ynskið hjá klaksvíkingum skal vinna frama, so er neyðugt, at aðalfundurin 2. hvítusunnudag samtykkir at broyta grein 11 í reglunum fyri FM í kappróðri. Har er ásett, hvussu langir teinarnir eru, og har stendur eisini, at um umstøðurnar eru soleiðis, at teinurin ikki kann vera sum ásett, kann hann verða styttur.

Sambært formanninum í Róðrarsambandinum, Hannisi Joensen, so hevur hetta verið skilt soleiðis, at róð hevur verið á so longum teinum, sum tað hevur borið til. Í t. d. Havnini, Miðvági, Vági og Vestmanna ber tað ikki til at rógva longri enn á túsund metrum, og í einstøku førunum hevur tað verið upp til høvuðsdómaran at gera av, um hann hevur hildið tað orsaka av veðri verið ov ófantaligt at kappast á 2000 metrum.

- Uppskotið frá klaksvíkingum hevur verið viðgjørt í nevndini. Har er hugburðurin tann, at tað skal vera upp til tey, sum kappast, at gera spurningin av, og nú hava tey frá fyrireikarunum í Klaksvík fingið útgreining av, hví tey vilja sleppa at royna bara at kappast á 1000 metrum.

Í áheitanini til RSF siga klaksvíkingar, at teirra fatan er, at teir flestu, sum kappast á longru teinunum, fegnir vilja halda fram við hesum. RSF formaðurin hevur eisini ta fatan, at flestu rógvararnir vilja kappast á so longum teinum, sum tað ber til, og at harmast var um tað, tá ið tað var neyðugt at stytta teinin hjá 10-mannafórunum á Norðoyastevnu úr 2000 og niður í 1500 metrar.

### Skal ganga skjótari fyri seg

Í viðmerkingunum til áheitanina, sum er send aðalfundinum í RSF, siga tey í Klaksvíkar Róðrarfelag, at tað hjá teimum er ynskiligt, at kappingarnar verða skjótari avgreiddar, enn tær hava verið seinnu árini. Tey hava gjøgnumgingið róðurin á Norðoyastevnu í fjør, og hóast samlaða kappingartíðin var longri enn tríggjar tímar, so siga tey í Klaksvík seg ikki kunna seta fingurin á nakað, sum tók longri tíð, enn tað kundi gera.

Hóast Róðrarsambandið eigur tveir fastar startir, so er tað, sum fer við mest tíð, at flyta fasta startin av 1000 metra málinum og út á 1500 metra málið. Umstøðurnar á vánni í Klaksvík eru soleiðis, at tað er neyðugt at spenna startin fastan í eystara landið. Teinurin frá bátinum, sum heldur fasta startinum á 1500 metra málinum, og inn á land er einar 700 metrar. Tí er neyðugt eisini at nýta søkk, og tað hevur víst seg at vera ein trupulleiki, tá ið veðrið ikki er til vildar.

Klaksvíkingar vísa á, at Norðoyastevnan er tíðliga á árinum, og at tað kann roknast við møguleikanum fyri ólagaligum líkindum síðst í mai og fyrst í juni. Tí kunnu trupulleikar stinga seg upp, sum teir ikki høvdu í fjør, tá ið líkindini vóru avbera góð, og tað kann bera við sær, at róðrartíðin verður uppaftur longri. Tað halda tey ikki er nøktandi - hvørki fyri rógvarar ella áskoðarar - og tí vilja tey gera roynd, har tað bara verður kappast á 1000 metrum. So ætla teir í eftirmeting at gera av, um tað í framtíðini bara skal verða kappast á 1000 metrum á Norðoyastevnu, ella um teir skulu fara aftur á 1500 metrar.

# Toppdysturin verður á Toftum

**Hvalbingar fara í vikuskiftinum á legu í Nesvík, og tí verður toppdysturin móti B68 á Toftum og ikki í Hvalba**

2. DEILD

*Jóannes Hansen*

Eftir tvey tey fyrstu umførini eru tað tvey feløg, sum hava fingið fult stigatal. Tey eru Royn og B68. Toftamenn hava vunnið móti B36 og HB, og Royn hevur vunnið móti FSV04 og B36.

Sambært skipanini skulu Royn og B68 takast í Hvalba hvítusunnuaftan ella nú leygardagin. Men nú er hetta broytt, soleiðis at tað í staðin fyri í Hvalba fer at verða spælt á Toftum. Dysturin millum B68 og Royn í 13. umfari, sum sambært skipanini skal vera á Toftum 27. august, verður í staðin spældur í Hvalba.

Tað eru hvalbingar, sum hava biðið um, at tað verður bytt um upp á dystirnar. Orsøkin er tann, at tað á hvítusunnu verður Hvalbiar lega, sum tað verður nevnt, í leguhúsinum í Nesvík. Tí hava hvalbingar hildið, at tað hevði verið ólagaligt, um toppdystur í 2. deild skuldi verið í Hvalba hvítusunnuaftan. Nú verður dysturin á Toftum, og so verður tað ivaleyst soleiðis, at hvalbingar fara mannsterkir úr Nesvík og á Svangaskarð at taka á við sínum monnum.

Bestu liðini hjá B68 og Royn hava ikki spælt landskappingardyst ímóti hvørjum øðrum síðani í 1980, tá ið B68 vann 2. deild og frá 1981 og inntil í fjør var í bestu deildini.